# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Pól Skarðenni sýnir fram í Fjørukrónni

LISTAFRAMSÝNING

Tann 23. apríl og ein mánað hevur Pól Skarðenni framsýning á Fjørukrónni í Vestmanna.

Í sirminum leygardagin kom myndamaðurin fram á Pól oman fyri Vestmanna Skipasmiðju, har hann málaði ein oljumálning til nevndu framsýning.

Pól sigur, at hann hevur gjørt nakrar oljumálningar úr vestmanna í seinatuni, tí hann veit av royndum, at fólk vilja síggja okkurt úr sínum egna umhvørvi.




*Pól Skarðenni leygardagin oman fyri skipasmiðjuna í Vestmanna, har hann málaði lokalan málning*

*Myndir: Birgir Waag Høgnesen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ala Monrad**, fødd Jensen úr Vági, andaðist páskadag á Bispebjerg Hospitali, 90 ár. Jarðarferðin verður mikudagin 26. apríl kl. 10 frá Garnison kirkju.

**Poul Martin Eliasen** fer til gravar úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey ið vilja minnast Martin kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið Vesturstovu í Fuglafirði

Kistan við **Elmu Erningsdóttir Djurhuus**, Nes Vági, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í dag kl. 18. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági mikudagin kl. 12.30. Tey ið vilja minnast Elmu, kunnu lata eina gávu til Kristnastovu, konto í peningastovnunum.

Kistan við **Jastrid Marnu Jacobsen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 14. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Jastrid kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Sparissa.

**Marjun Wágsnes Niclasen** andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi páskadag, 82 ára gomul.

### Dagurin í morgin

**19. apríl. Dánjal.** Ein av teimum fýra profetunum í Gamla testamenti. Bíbilska navnið merkir Guð er dómari mím.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 16 2006

# Rávørur á sera høgum stigi

MARKNAÐARRÁK

At kalla allar rávørur, ið verða handlaðar á alheims fíggjarmarknaðum, eru hækkaðar munandi seinasta árið. I hesum tíðarskeiðinum er m.a. oljan hækkað 33%, gass 35%, gull og aluminium 39% og kopar heili 83%. Hesar hækkingar ávirka prísvøksturin í heiminum. Nú amerikanski tjóðbankin og evropiski miðbankin eru byrjaðir at hækka leiðandi renturnar m.a. við grundgeving í prísvakstrargongdini, er gongdin á rávørumarknaðunum veruliga komin í andglettin. Hækkandi rávøruprísirnir kunnu fara at tálma búskaparvøksturin um okkara leiðir, men enn er hetta ikki sannlíkt. Heldur vera høgu rávøruprísirnir tengdir at prísvøkstrinum og hetta kann føra við sær fleiri rentuhækkingar.

### Renturnar hækkaðar

Lánsbrævarenturnar hildu á at hækka um páskini. Danska 10-ára rentan er nú 4,01%. Hetta er fyrstu ferð síðan novembur í 2004, at hon er oman fyri 4%. 10-ára rentan er sostatt hækkað 0,72%-stig higartil í ár. Ein mótrørsla niður í rentu er væntandi.

### Nokia hevur uppmett inntøkurnar

Farna týsdag uppmetti heimsins størsti fartelefonframleiðari, Nokia, inntøkumetingarnar fyri 1. ársfjórðing. Hetta er onnur bjarta fráboðanin frá Nokia í stutta tíð. Seinastu dagarnar av mars uppmettu tey eisini metingarnar um vøksturin á fartelefonmarknaðinum. Kurshækkingin í Nokia kann halda fram, eisini nú Nokia væntandi fer at keypa egin partabrøv. Kursurin á Nokia er hækkaður 18% í 17,25 evrur síðani februar. Kaupthing metir at kursurin kann at hækka í 19,2 næstu mánaðirnar.

### Hesa vikuna

Nú prísvøkstur er í andglettinum er áhugavert, at prísvakstrartøl úr bæði USA og Evropa verða kunngjørd hesa vikuna. Vikan verður eisini merkt av, at m.a. IBM, Texas Instruments, Yahoo!, Motorola, Apple, Intel, Nokia og Ericsson kunngera roknskap fyri 1. ársfjórðing. Roknast skal tí ikki við, at fíggjarmarknaðirnir verða stillir hesa vikuna.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 616,53 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 5,20 | -0,1% | ↓ |
| GBP | 1.078,48 | 0,4% | ↑ |
| NOK | 95,03 | -0,1% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 100,63 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 168,15 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabr | 119,93 | -0,1% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 74,11 | -1,2% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*